## út at koyra

### 1999 metár hjá GM

Umsetningurin hjá General Motors var tilsamans 176,6 milliardir dollarar (uml.1.500 milliardir svenskar krónur) í 1999. Hetta er ein vøkstur uppá 13,6% sammet við 1998.

**kelda: Saab i dag**




### Daewoo

Suðurkoreanska Daewoofyritøkan eigur SsangYong bilverksmiðjuna, sum keypir motorar frá Mercedes. Daewoo hevur menningarsamstarv við Opel og tekniskt samstarv við Suzuki.

**Kelda: Bilen Motor & Sport**



### Fiat Multipla »Årets bil i Danmark 2000«

Motorjournalisternes Klub Danmark hava kosið Fiat Multipla til »Årets bil i Danmark 2000«. Teir siga í eini viðmerking: »Nogen smuk svane bliver Multipla dog aldrig, den skal elskes på trods ef sin grimhed på samme måde som Citroën 2CV har sat utallige hjerter i brand…«

**kelda: FDM / Motor**

# Volvo V70, føddur sum stationvognur




*Hóast nýggi Volvo V70 er bygdur yvir sama plattform, sum Volvo S80, er hann ein meira kompaktur*

MAGNUS GUNNARSSON

Krøvini til bilaframleiðarar hava ongantíð verið størri enn í dag. Bilurin skal vera tryggur, umhvørvisvinarligur, rúmligur og fjølbroyttur. Kortini skal hann vera spennandi og hava góðar koyrieginleikar. Volvo vil vera við, at alt hetta fáa kundarnir í tí nýggja Volvo V70, sum kemur á marknaðin í mars mánaði.

**Trygdin er innbygd í bilin**

Hóast nýggi Volvo V70 er bygdur yvir sama plattform, sum Volvo S80, er hann ein meira kompaktur bilur, sum ikki er bygdur yvir ein persónvogn, men er ein nýggjur stationvognur.

Volvo V70 hevur alt, sum eyðkennir ein nýmótans Volvo. Bilurin hevur skandinaviskan form, er sterkur, tíðarleysur, snøggur, praktiskur og fjølbroyttur.

Hjá Volvo er trygd ikki tað sama, sum at bilurin hevur so nógvar ymiskar trygdarskipanir sum møguligt. Ístaðin er tað heildin, sum telur — at trygdin er grundleggjandi innbygd í bilin. Vil man hava mest møguliga verju í bilin, skulu tann aktiva og passiva trygdin arbeiða saman.

**Dual Stage Airbag**

Volvo V70 er útgjørdur við einum nýggjum airbag, Dual Stage Airbag. Hendan nýggja Airbag hevur betri samanspæl við trygdarbeltini. Í samanstoyti strammast fyrst trygdarbeltið um tann ferðandi, so gevur beltið nakað eftir fyri at støðga kroppinum á ein bleytan hátt, og til seinast endar airbag'in verndararbeiðið. V70 hevur tey nýggjastu ergonomisku seterini hjá Volvo.

Allir motorarnir hava 5 sylindarar, bæði bensin og diesel. Í fyrstu atløgu verða tríggir motorar at velja ímillum, seinni í summar koma tveir afturat.

**Kelda: Volvo Personvogne Danmark A/S**

### Suzuki XL6

Á bilframsýningini í Detroit var ein nýggjur Suzuki jeepur, ið er nakað størri enn Suzuki Vitara, sum er sera vælumtóktur sum vøruvognur í Danmark. Hesin nýggi jeepurin, við kodunavninum XL6, hevur ein 6 syl. motor, trý røð av setrum og er væl útgjørdur. Framleiðslan byrjar í heyst, og Suzuki leiðslan lovar, at hann kemur til Europa næsta vár.

**kelda: Motor-magasinet**







## út at koyra



*Av góðum grundum minnir Kia Carnival mest um ein amerikanskan MPV — bæði í støðd og at koyra. Bilurin er serliga ætlaður amerikanska marknaðinum, har Chrysler eru førandi innan MPV bilar*

**Mynd: Jens Kristian Vang**

# Kia Carnival, ein koreanskur luksus MPV

MAGNUS GUNNARSSON

Kia Motors í Suðurkorea ger alt frá smáum býbilum til luksusbilar, harímillum er Kia Carnival, ið er ein rættuligur 7 persóna bilur við nógvum møguleikum, alt eftir hvønn tørv tú hevur, um tað skal vera ein familjubilur, firmabilur, minibussur ella ein frítíðarbussur.

**Setrini, eitt hav av møguleikum**

Tað at Kia Carnival minnir mest um ein amerikanskan MPV, bæði í støðd og at koyra, er sum vera man tilætlað, tá bilurin serliga skal gera seg galdandi í USA, har Chrysler eru førandi innan MPV bilar.

Bilurin er væl innrættaður, við ríkiligum plássi til sjey persónar. Bilførarin situr væl, og alt rundan um hann er sera væl innrættað, eisini hevur hann møguleika at fara úr forsetrinum og oman á aftasta rað, uttan at at skula út.

Framman er pláss til tveir persónar, í miðjuni, eisini tveir, og aftast er pláss til tríggjar persónar. Tá hetta er sagt, er tað torførasta eftir, tí tað eru so nógvir møguleikar við innstilling og flyting av setrum, at tað næstan ikki ber til at greiða frá skrivliga.

Mittastu sertini kunnu vendast 180 stig, soleiðis at tey ferðandi kunnu sita yvirav teimum á tí aftasta setrinum, eins og baksmekkan kann gerast til eitt borð. Sera lætt og smart.

Aftasta setrið kann næstan alt, sum hugsast kann: Stólaryggurin kann stillast og setrið flytast frameftir og aftureftir, leggjast saman og skumpast fram ímóti miðsetrunum, so at viðførisrúmið verður størri. Eisini kann tað leggjast heilt afturav, soleiðis at tá baklúkan er opin, ber til at sita á baksmekkuni og fiska síl.

**Næstan sum at koyra ein amerikanara**

Kia Carnival LS er sera væl útgjørdur við dupultum airbag, ABS bremsum, servostýring, sentrallási, radio við fløguspælara, startsperru, og el-rútum í forhurðunum. el-spegl við varma, takstativi, el-antennu, aftasti síðurúturin kann latast upp, tvey varmaapparat (framman og aftan).

Bilurin er góður og lættur at koyra í býnum, hóast hann er stórur. Á longum strekkjum er tað næstan sum at koyra ein amerikanskan bil.

2.9 Turbo Diesel motorurin við Intercooler hevur góða kraft og bilurin er tryggur á vegnum.

Carnival er sera ljóðleysur og lutfalsliga lítið hoyrist til dieselmotorin, dekkini ella til vind. Kia Carnival rúmar líka nógv, og kann tað sama, sum fleiri av teimum dýraru kappingarneytunum.

Eisini er hann væl egnaður sum vørubilur við dragihurðum á báðum síðum.

KIA MOTORS

## Carnival

**Motorurin:** 2.9 l Turbo Diesel Intercooler
4 syl. 16 Ventilar 126 hk.

**Trekk:** Framman

**Dekk:** 215/65-15

**Bremsur:** skivur framman og trumlur aftan

**Støðd og vekt:**

| | |
|---|---|
| Longd: | 489,0 cm |
| Breidd: | 190,0 cm |
| Hædd: | 173,0 cm |
| Eginvekt: | 1850 kg |
| Totalvekt: | 2650 kg |

**Prísur:**

| | |
|---|---|
| LS 2.9 TDI | 25800 |
| LS 2.9 TDI vørubilur | 187800,- |
| LS 2.5 V-6 24V | 225800 |

**Søluumboð:**

*D.B. Bilar*
*Jónas broncksgøta 15*
*FO-100 Tórshavn*
*Tlf. 310600*





